Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	23.09.2026
Mál nr.:	26/01287
Málsviðgjørt:	TM
Ummælistíð:	16. januar 2026 til 27. februar 2026
Eftirkannað:	17.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at seta úr gildi lov om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v., lov for Færøerne om Statistik, løgtingslóg um statistikk, løgtingslóg um prístal og løgtingslóg um manntal í 2011

§ 1. Við hesum verða settar úr gildi:

1) Lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v.
2) Lov nr. 95 af 25. marts 1933 for Færøerne om Statistik.
3) Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk.
4) Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal.
5) Løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið hevur til endamáls at seta úr gildi gamla lóggávu á økinum viðvíkjandi almennum hagtølum, sum er óneyðug, annaðhvørt tí nýggjari lóggáva er komin í staðin, ella tí at lóggávan hevur rokkið sínum endamáli, og tí ikki er viðkomandi longur. Yvirskipaða endamálið er sostatt at gera føroyska lógarverkið á økinum viðvíkjandi almennum hagtølum meira einfalt til frama fyri bæði borgarar og myndugleikar.

Talan er um eldri lógir, sum áttu at verið settar úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi, umframt um lógina, sum viðvíkir manntali í 2011.

Til tess at tryggja eitt so greitt og gjøgnumskygt lógarverk sum gjørligt er umráðandi, at óneyðug og óviðkomandi lóggáva verður sett úr gildi. Í hesum føri er talan um, at nýggj føroysk lóggáva er komin í staðin fyri gamla danska lóggávu, eins og talan er um lóggávu, sum hevur rokkið sínum endamáli og tí ikki er viðkomandi longur.

Ítøkiliga setur lógaruppskotið úr gildi fylgjandi fimm eldri lógir um hagtøl og líknandi:

1) Lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 209 frá 15. desember 2025,
2) Lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik, sum broytt við løgtingslóg nr. 209 frá 15. desember 2025,
3) Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk, sum broytt við løgtingslóg nr. 149 frá 19. desember 2023,
4) Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 107 frá 13. juni 1997, og
5) Løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011.

Lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v.

Lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v. ásetir millum annað, at "*Det paahviler Husejere saavel som Lejere af Beboelseslejligheder eller Forretningslokaler, naar de fra Kommunalbestyrelsen modtager Henvendelse derom, for de af dem ejede, respektive lejede Lejligheder at afgive Oplysninger for hver enkelt Lejlighed om Huslejen, Lejlighedens Beliggenhed og Størrelse, dens Indretning og Anvendelse og om Antallet af Beboere i Lejligheden.*"

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Í § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya er ásett, at "*Hagstova Føroya hevur heimild til at krevja sær allar neyðugar upplýsingar frá einstaklingum, fyritøkum, feløgum og stovnum við heimstaði ella virksemi í Føroyum um tey samfelagsviðurskifti, sum hon skal lýsa smb. § 1, stk. 2.*"

Lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v. er leivd frá eldri tíð og er ikki viðkomandi longur. Leggjast kann eisini afturat, at lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v. hevur ikki verið

brúkt í longri tíð. Metast má tí, at lógin kann verða sett úr gildi eftir meginregluni um, at lóg missir rættarvirði, tí hon verður ikki brúkt (desvetudo).

Mett verður tí, at lógin kann verða sett úr gildi. Mett verður, at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik
Lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik ásetir millum annað, at "*Hver Gang et færøsk Fiskerskib udlosser Fangst, skal Rederen, hvad enten Udlosningen sker paa Færøerne eller udenfor disse, give Oplysning om Fangsten paa dertil af vedkommende Ministerium godkendte Blanketter. Enhver paa Færøerne bosat, der erhverver Fisk fra andre Skibe end færøske Fiskerskibe, skal give lignende Oplysning.*"

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Í § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya er ásett, at "*Hagstova Føroya hevur heimild til at krevja sær allar neyðugar upplýsingar frá einstaklingum, fyritøkum, feløgum og stovnum við heimstaði ella virksemi í Føroyum um tey samfelagsviðurskifti, sum hon skal lýsa smb. § 1, stk. 2.*"

Løgtingslóg nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik er leivd frá eldri tíð og er ikki viðkomandi longur. Leggjast kann eisini afturat, at Løgtingslóg nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik hevur ikki verið brúkt í longri tíð. Metast má tí, at lógin kann verða sett úr gildi eftir meginregluni um, at lóg missir rættarvirði, tí hon verður ikki brúkt (desvetudo).

Mett verður tí, at lógin kann verða sett úr gildi. Mett verður, at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Leggjast kann aftrat, at bekendtgørelse nr. 6 af 9. januar 1936 om Statistik, sum broytt við bekendtgørelse nr. 160 af 20. juni 1936, er lýst við heimild í nevndu løgtingslóg. Bekendtgørelse nr. 6 af 9. januar 1936 om Statistik fer tí eisini úr gildi, samstundis sum løgtingslógin fer úr gildi. Nevnda kunngerð er eins og lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik ikki viðkomandi longur, er ein leivd frá eldri tíð, og hevur ikki verið brúkt í longri tíð.

Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk
Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk ásetir, at landsstýrinum verður heimilað til við kunngerð at seta neyðturviligar reglur í gildi statistikki viðvíkjandi fyri tey sambært lóg um heimastýri Føroya til heimastýrið fluttu sermál og harundir áleggja avvarðandi skyldu at geva neyðturviligar upplýsingar.

Lógin ásetir eisini, at brot móti teim av landsstýrinum kunngjørdu reglum verða at sekta til landskassan.

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Í § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya er ásett, at "*Hagstova Føroya hevur heimild til at krevja sær allar neyðugar upplýsingar frá einstaklingum, fyritøkum, feløgum og stovnum við heimstaði ella virksemi í Føroyum um tey samfelagsviðurskifti, sum hon skal lýsa smb. § 1, stk. 2.*"

Løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk er leivd frá eldri tíð og er ikki viðkomandi longur. Leggjast kann eisini afturat, at løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk hevur ikki verið brúkt í longri tíð. Metast má tí, at lógin kann verða sett úr gildi eftir meginregluni um, at lóg missir rættarvirði, tí hon verður ikki brúkt (desvetudo).

Mett verður tí, at lógin kann verða sett úr gildi. Mett verður, at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Leggjast kann aftrat, at kunngerð nr. 39 frá 24. mars 1950 um fiskivinnustatistikk fyri Føroyar er lýst við heimild í nevndu løgtingslóg. Kunngerð nr. 39 frá 24. mars 1950 um fiskivinnustatistikk fyri Føroyar fer tí eisini úr gildi, samstundis sum løgtingslógin fer úr gildi. Nevnda kunngerð er eins og løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk ikki viðkomandi longur, er ein leivd frá eldri tíð, og hevur ikki verið brúkt í longri tíð.

Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal

Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal ásetir, at Hagstova Føroya útroknar eitt prístal, sum hevur januar 1983 = 100, við smásøluprísum á vørum, tænastum og bústaðarútreiðslum sum grundarlag.

Lógin ásetir eisini, at prístalið verður útroknað fýra ferðir árliga pr. 1. í hvørjum ársfjórðingi eftir teimum vørunøgdum v.m., sum til eina og hvørja tíð eru løggildar av landsstýrinum sum prístalsgrundarlag.

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, sum innan játtanarkarmarnar sjálvur leggur sítt virksemi til rættis. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Frammanundan var Hagdeild undir landsstýrinum, sum røkti hagtalsuppgávur.

Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal er leivd frá tíðini, tá ið Hagdeildin virkaði undir landsstýrinum og røkti hagtalsuppgávur.

Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal er tí ikki viðkomandi longur, tí viðurskiftini kring Hagstovuna eru nú ásett í løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Leggjast kann eisini afturat, at løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal hevur ikki verið brúkt í longri tíð. Metast má tí, at lógin kann verða sett úr gildi eftir meginregluni um, at lóg missir rættarvirði, tí hon verður ikki brúkt (desvetudo).

Mett verður tí, at lógin kann verða sett úr gildi. Mett verður, at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011
Manntal 2011 var er ein hending, har farið varð í hvørt hús í landinum við tí fyri eyga at tekna og fáa eina breiða og neyva mynd av, hvussu Føroyar sóu út í 2011. Manntal 2011 var ein almenn verkætlan, skipað og stýrd av Hagstovu Føroya.

Við løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 varð heimild givin at halda manntal í 2011. Ásett varð, hvat spyrjast kundi um, og at fólk høvdu skyldu at svara spurningunum. Eisini varð ásett, hvussu upplýsingarnar, sum komu í manntalinum, kundu brúkast, og hvussu upplýsingarnar skuldu goymast og varðveitast.

Verkætlanin Manntal 2011 er liðug og avgreidd, og Løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 hevur tí tænt sínum endamáli. Mett verður tískil, at lógin kann verða sett úr gildi.

1.2. Galdandi lóggáva
Víst verður til pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið setur úr gildi fimm eldri lógir, sum ikki longur eru viðkomandi. Víst verður til pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið setur úr gildi fimm eldri lógir, sum ikki longur eru viðkomandi. Víst verður til pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Hagstovuni. Uppskotið hevur harafturat verið til almenna hoyring í tíðarskeiðinum 16. januar 2026 til 27. februar 2026.

Hagstovan tekur undir við málinum og vísir í ummælinum á, at talan er um eldri lógir og kunngerðir, sum eru settar í gildi áðrenn løgtingslógina um Hagstovu Føroya frá 1991, og sum ikki longur eru neyðugar fyri virkisførið hjá Hagstovu Føroya. Hagstova Føroya hevur tí ikki viðmerkingar til, at hesar lógir verða settar úr gildi. Hagstovan vísir eisini á, at løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 var ein tíðaravmarkað lógarheimild til at fremja eina fólkateljing undir Hagstovu Føroya. Lógin um manntal í 2011 hevur tí ikki týdning í dag.

Fíggjarmálaráðið móttók ikki nakað annað ummæli av lógaruppskotinum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land ella fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið hevur uppskotið ta umsitingarligu avleiðing, at samlaða lógarverkið viðvíkjandi almennum hagtølum í Føroyum verður einfaldari. Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávís øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru ikki viðkomandi á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um. Uppskotið verður mett at samsvara við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]	[redacted]	Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Ásett verður, at lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v. verður sett úr gildi.

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Mett verður, at lov nr. 481 af 10. september 1920 om afgivelse af statistiske oplysninger om husleje m.v. kann verða sett úr gildi, og at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Til § 1, nr. 2
Ásett verður, at lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik verður sett úr gildi. Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Neyðugu heimildirnar til innsavnan av hagtølum eru savnaðar í nevndu løgtingslóg.

Mett verður, at lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik kann verða sett úr gildi, og at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Nevnast kann, at bekendtgørelse nr. 6 af 9. januar 1936 om Statistik, sum broytt við bekendtgørelse nr. 160 af 20. juni 1936, er lýst við heimild í nevndu løgtingslóg. Bekendtgørelse nr. 6 af 9. januar 1936 om Statistik fer tí eisini úr gildi, samstundis sum løgtingslógin fer úr gildi. Nevnda kunngerð er eins og lov nr. 95 af 25. marts 1933 om Statistik ikki viðkomandi longur, er ein leivd frá eldri tíð, og hevur ikki verið brúkt í longri tíð.

Til § 1, nr. 3
Ásett verður, at løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk verður sett úr gildi. Nevnda lóg ásetir millum annað, at landsstýrinum verður heimilað til við kunngerð at seta neyðturviligar reglur í gildi statistikki viðvíkjandi fyri tey sambært lóg um heimastýri Føroya til heimastýrið fluttu sermál og harundir áleggja avvarðandi skyldu at geva neyðturviligar upplýsingar. Lógin ásetir eisini, at brot móti teim av landsstýrinum kunngjørdu reglum verða at sekta til landskassan.

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya.

Mett verður, at løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk kann verða sett úr gildi, og at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Leggjast kann aftrat, at kunngerð nr. 39 frá 24. mars 1950 um fiskivinnustatistikk fyri Føroyar er lýst við heimild í nevndu løgtingslóg. Kunngerð nr. 39 frá 24. mars 1950 um fiskivinnustatistikk fyri Føroyar fer tí eisini úr gildi, samstundis sum løgtingslógin fer úr gildi. Nevnda kunngerð er eins og løgtingslóg nr. 1 frá 3. januar 1950 um statistikk ikki viðkomandi longur, er ein leivd frá eldri tíð, og hevur ikki verið brúkt í longri tíð.

Til § 1, nr. 4
Ásett verður, at løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal verður sett úr gildi. Nevnda lóg ásetir millum annað, at Hagstova Føroya útroknar eitt prístal, sum hevur januar 1983 = 100, við smásøluprísum á vørum, tænastum og bústaðarútreiðslum sum grundarlag. Lógin ásetir eisini, at prístalið verður útroknað fýra ferðir árliga pr. 1. í hvørjum ársfjórðingi eftir teimum vørunøgdum v.m., sum til eina og hvørja tíð eru løggildar av landsstýrinum sum prístalsgrundarlag.

Skipanin við framleiðslu av almennum hagtølum er í dag hon, at Hagstova Føroya er sjálvstøðugur og óheftur stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, sum innan játtanarkarmarnar sjálvur leggur sítt virksemi til rættis. Hagstova Føroya virkar sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya. Frammanundan var Hagdeild undir landsstýrinum, sum røkti hagtalsuppgávur. Løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal er leivd frá tíðini, tá ið Hagdeildin virkaði undir landsstýrinum og røkti hagtalsuppgávur.

Mett verður, at løgtingslóg nr. 30 frá 21. mai 1975 um prístal kann verða sett úr gildi. Mett verður, at lógin átti at verið sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya varð sett í gildi.

Til § 1, nr. 5
Við løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 varð heimild givin at halda manntal í 2011. Ásett varð, hvat spyrjast kundi um, og at fólk høvdu skyldu at svara spurningunum. Eisini varð ásett, hvussu upplýsingarnar, sum komu í manntalinum, kundu brúkast, og hvussu upplýsingarnar skuldu goymast og varðveitast. Verkætlanin Manntal 2011 er liðug og avgreidd, og løgtingslóg nr. 64 frá 26. mai 2011 um manntal í 2011 hevur tí tænt sínum endamáli. Mett verður tískil, at lógin kann verða sett úr gildi.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 23.09.2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Hagstovu Føroya